# – Olja og umhvørvi eiga at vera saman

Løgmaður ger sum hann vil, og heldur hann, at umhvørvi ikki skal hoyra undir oljumálastýrinum, so vil eg rætta meg eftir tí, sigur Eyðun Elttør, oljumálaráðharri, men tað er ikki heilt burturvið at hava olju og umhvørvi undir sama landsstýrismanni

LEIF LAADAL

Ein skotskur professari vísti í summar á, at tað ikki er trygt at hava olju og umhvørvi undir sama stýri. Løgmaður segði tá, at tað ikki var óhugsandi, at umhvørvi og olja fóru at verða skild frá hvørjum øðrum í Føroyum.

Eyðun Elttør umsitur olju og umhvørvi, men hann heldur ikki at tað er nakar vandi at hava hesi bæði málsøkir undir sama landsstýrismanni.

– Hygg til dømis eftir Danmark. Svend Augen umsitur bæði orku og umhvørvi og eingin kann seta ein fingur á hansara umhvørvisarbeiði, sigur Eyðun Elttør.



**Tað, at olja og umhvørvi hoyrir undir sama landsstýrismann, kann eisini vera ein fyrimunur, sigur Eyðun Elttør, oljumálaráðharri**

### Fyrimunur

Eyðun Elttør heldur at tað kann verða ein beinleiðis fyrimunur at hava oljuna og umhvørvi undir sama taki.

– Sjálvandi má onkur trygd vera fyri, at tað eina øki ikki sleppur lættari, av tí at hitt verður stýrt av sama manni, men hetta hava vit hugsa um, sigur Eyðun Elttør og vísir á, at umhvørvisdeildin verður stýrd av Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, sum sleppur at arbeiða fulkomiliga leyst av oljuni.

Í sambandi við umsóknir at sleppa bora og útvinna olju við Føroyar, so fáa oljufeløgini at vita hvørji fíggjarlig- og umhvørviskrøv í verða sett. Eyðun Elttør heldur, at tað er upp á sítt pláss, at øll krøv og allar lógir viðvíkjandi oljuloyvum finnast á einum staði.

– Oljufeløgini arbeiða eftir teimum lógum og reglum, sum eru galdandi, og tá tey koma til okkum, fáa tey at vita hvussu alt hongur saman, bæði viðvíkjandi sjálvum loyvinum og teimum umhvørvistreytum, sum vit seta, sigur Eyðun Elttør, sum heldur, at hetta kann verða ein beinleiðis fyrimunur, tá ið umsóknirnar fara at koma um loyvið at bora.

– Tá ið olja og umhvørvi liggur í sama stýrið, so eigur ikki at bera til at arbeiða uttanum hvønn annan. Á hendan hátt verða loyvir og krøv samskipaði og oljufeløgini fara heilt sikkurt at lurta og fylgja krøvunum, tí tað eru ikki smápengar sum eru upp á spæl, sigur oljumálaráðharrin.

### Til Skotlands

Meðan føroyingar bíða eftir teimum svørtu gulldropunum, kunnu teir fara til Skotlands.

Skotar hava drúgvar royndir innan oljuvinnu og hetta merkist nú bjóða verður til oljuframsýning í Aberdeen. Framsýningin letur upp 7. september og tá vitjar føroyski oljumálaráðharrin eisini básarnar.

Tvey flogfør fara úr Føroyum til Skotlands teir dagarnar framsýningin er, og ferðavinnufeløg í Føroyum meta, at eini 140 føroyingar vera við á framsýningini. Um tey so síggjast aftur, tað er ein spurningur, tí eini 25000 fólk vitjaðu á framsýningini fyri tveimum árum síðani og í ár verður hetta tal óivað enn størri.

# Vatnreisiverk í Klaksvík royndarkoyrt

Tað nýggja vatnreinsiverkið við Anagjógv í Klaksvík verður nú royndarkoyrt, áðrenn tað í næstu viku verður klárt at taka í nýtslu

FRANTS JENSEN

– Eftir ætlan verður vatni frá Anagjógv, Svartadali og Strandadali reinsað í næstu viku, sigur Heri Hammer, býarverkfrøðingurin.

Reinsað vatn kemur soleiðis at renna í kranunum á eystaru síðu av Klaksvík. Harumframt fáa fiskavirkini á vestaru síðu eisini søttreinsað vatn, tí vatn verður leitt yvir um vánna til virkini á hesari síðuni. Restina av vestaru síða av Klaksvíkini má hinvegin bíða eitt ár, áðrenn vatnreinsiverki uppi á Uppsølum verður klárt at taka í nýtslu.



Vatnroynsiverkið við Ánagjógv klárar at reinsa 165 tons av vatni um tíman. Vatnið fer ígjøgnum sandfiltur og verður uv-strálað, og um neyðugt kann eisini klor setast til.

Kósin hevur sum nú er eitt reinsiverk, sum reinsar 110 tons av vatni um tíman. Hetta verkið verður flutt niðan á Uppsalir næsta ár.

– Vit hava gjørt avtalu við SEV, at vit eisini kunnu nýta vatn frá byrgingini í Strandadali, samstundis sum teir lova altíð at hava byrgingina fulla. Hetta hevur longu verið neyðugt í summar í turkrinum, sigur Heri Hammer.

Sjalvur hevur hann bara arbeitt í trý ár sum býarverkfrøðingur, men turkur hevur verið tvey av sumrunum. Tí metir hann, tað er neyðugt við stórari vatngoymslu.

SEV-byrgingin í Strandadali tekur 35.000 tons av vatni, og tað kemur væl við hjá Klaksvíkini eisini at kunna nýta hetta vatnið.

– Vit hava mest yvirflatuvatn og tí hava vit ikki bara trupulleika um sumrarnar við vatni. Tá ið tað frystur um veturin kann eisini verða trupulleiki, og tí kemur byrgingin væl við, sigur Heri.

### 11 – 12 mió.

Við Ánagjógv er ein brunnur sum tekur 1.800 tons av vatni. Næsta ár verður ein brunnur gjørdur afturat, og verða sostatt pláss til 3.600 tons av vatni við Ánagjógv. Uppi við Uppsalir eru fýra brunnar sum tilsaman taka 2.400 tons av vatni. Saman við onkrum smáum øðrum nøgdum verða goymslur til gott 6.000 tons av vatni.

– Býurin nýtir millum 2 og 3.000 tons av vatni um samdøgrið, og skuldi tað tí rokkið til einar tríggjar dagar. Men nú hava vit eisini byrgingina, og so er nakað av vatninum kelduvatn, sum allatíðina rennur uppiaftur. Annars regnar tað altíð eitt sindur her í Klaksvík, sigur Heri og flennir. Hann undirstrikar tó, at málingar vísa, at tað ikki regnar mest í Klaksvík.

Árnafjørður er eisini ein partur av Klaksvíkar kommunu, og har verður eisini arbeitt við at reinsa vatni. Her verður hugsað um eina minni ætlan sum reinsar 30 tons um tíman.

Sjálvt vatnreinsiverkið hjá Klaksvíkar kommunu við Ánagjógv kostar umleið 1,3 mió. Øll ætlanin kemur tó at kosta 9 mió. krónur, tá ið hon er liðug næsta ár. Av hesum eru umleið 6,5 mió. brúktar. Hetta er brúkt til brunn, vatnleiðingar, hús, og annað. Reinsiverkið á eystaru síðu kemur at kosta millum 2 og 3 mió., tá ið tað verður liðugt – eisini næsta ár.

# Fiskamarknaður Føroya

Samlaða søluyvirlit hjá Fiskamarknaðinum í viku 33 1999 vísir, at 103 avreiðingar hava verið á samlaðu gólvsøluni hjá Fiskamarknaði Føroya frá 16. til 21. august.Seld vóru 37,7 tons fyri 438.097 kr. Her var í miðal kiloprísurin, tá øll fiskasløg verða tikin undir einum, 11,63 kr.

Yvirlitið hjá Fiskamarknaðinum yvir avreiðingarnar á gólvsøluni 33. viku í juli sær soleiðis út:

| FISKASLAG | KILO ÍALT | KRÓNUR ÍALT | MIÐAL PRÍSUR | HÆGSTI PRÍSUR | LÆGSTI PRÍSUR |
|---|---|---|---|---|---|
| TOSKUR YMSAR ST. | 228,00 | 2.736,00 | 12,00 | 12,00 | 12,00 |
| TOSKUR 1 | 162,00 | 2.557,80 | 15,79 | 16,20 | 14,00 |
| TOSKUR 2 | 525,00 | 8.121,60 | 15,47 | 15,60 | 14,00 |
| TOSKUR 3 | 3.746,00 | 51.408,70 | 13,72 | 15,20 | 10,50 |
| TOSKUR 4 | 3.239,00 | 39.742,20 | 12,27 | 14,10 | 10,00 |
| TOSKUR 5 | 1.180,00 | 8.008,10 | 6,79 | 9,10 | 4,00 |
| HÝSA 0 | 882,00 | 11.971,50 | 13,57 | 15,50 | 11,00 |
| HÝSA 1 | 9.413,00 | 132.155,10 | 14,04 | 15,60 | 5,00 |
| HÝSA 2 | 997,00 | 12.051,80 | 12,09 | 14,80 | 10,00 |
| HÝSA 3 | 482,00 | 1.368,60 | 2,84 | 3,50 | 2,00 |
| HÝSA 1&2 | 3,00 | 24,00 | 8,00 | 8,00 | 8,00 |
| HVÍTINGUR | 1.578,00 | 10.821,20 | 6,86 | 7,40 | 3,50 |
| UPSI | 40,00 | 80,00 | 2,00 | 2,00 | 2,00 |
| UPSI 1 | 453,00 | 2.298,80 | 5,07 | 5,20 | 5,00 |
| UPSI 2 | 101,00 | 490,30 | 4,85 | 4,90 | 4,70 |
| UPSI 3 | 167,00 | 638,00 | 3,82 | 4,50 | 3,00 |
| UPSI 4 | 30,00 | 60,00 | 2,00 | 2,00 | 2,00 |
| UPSI 5 | 26,00 | 26,00 | 1,00 | 1,00 | 1,00 |
| BROSMA | 19,00 | 38,00 | 2,00 | 2,00 | 2,00 |
| BROSMA 2 | 337,00 | 1.608,00 | 4,77 | 5,00 | 4,00 |
| BROSMA 3 | 37,00 | 129,00 | 3,49 | 3,50 | 3,00 |
| BROSMA 2&3 | 1,00 | 3,00 | 3,00 | 3,00 | 3,00 |
| LONGA | 35,00 | 343,00 | 9,80 | 9,80 | 9,80 |
| LONGA 1 | 945,00 | 11.196,00 | 11,85 | 13,00 | 6,00 |
| LONGA 2 | 74,00 | 688,20 | 9,30 | 9,30 | 9,30 |
| LONGA 3 | 10,00 | 80,00 | 8,00 | 8,00 | 8,00 |
| LONGA 4 | 15,00 | 24,40 | 1,63 | 2,60 | 1,00 |
| BLÁLONGA | 204,00 | 1.224,00 | 6,00 | 6,00 | 6,00 |
| BLÁLONGA 1 | 86,00 | 748,20 | 8,70 | 8,70 | 8,70 |
| BLÁLONGA 2 | 63,00 | 315,00 | 5,00 | 5,00 | 5,00 |
| KONGAFISKUR | 1.473,00 | 11.146,00 | 7,57 | 8,00 | 2,00 |
| KONGAFISKUR 2 | 229,00 | 1.085,00 | 4,74 | 5,00 | 3,50 |
| KONGAFISKUR 4 | 132,00 | 195,50 | 1,48 | 1,50 | 1,00 |
| STEINBÍTUR | 641,00 | 6.279,50 | 9,80 | 18,00 | 1,00 |
| LIRI | 1.598,00 | 3.587,90 | 2,25 | 4,20 | 1,50 |
| HAVTASKA | 898,00 | 28.692,75 | 31,95 | 33,00 | 23,00 |
| HAVTASKA 2 | 13,00 | 435,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 |
| KALVI 1 | 225,00 | 10.313,50 | 45,84 | 48,00 | 40,00 |
| KALVI 2 | 325,00 | 13.306,00 | 40,94 | 47,00 | 40,00 |
| KALVI 3 | 68,00 | 2.182,00 | 32,09 | 40,00 | 28,00 |
| KALVI 4 | 33,00 | 874,00 | 26,48 | 40,00 | 18,00 |
| KALVI 5 | 3,00 | 25,00 | 8,33 | 9,00 | 8,00 |
| SVARTKALVI | 3.882,00 | 43.349,50 | 11,17 | 12,00 | 7,00 |
| REYÐSPRØKA | 99,00 | 1.282,00 | 12,95 | 14,00 | 8,00 |
| TUNGA | 497,00 | 6.090,00 | 12,25 | 14,00 | 10,00 |
| SKØTA | 605,00 | 1.347,80 | 2,23 | 5,20 | 2,00 |
| SKRUBBA | 228,00 | 228,00 | 1,00 | 1,00 | 1,00 |
| HVASSKVOYSA | 9,00 | 135,00 | 15,00 | 15,00 | 15,00 |
| HÁVUR | 1,00 | 2,00 | 2,00 | 2,00 | 2,00 |
| SILD | 1.332,00 | 2.082,00 | 1,56 | 2,50 | 1,00 |
| LAKSASTYRJA | 299,00 | 4.485,00 | 15,00 | 15,00 | 15,00 |
| ANNAÐ | 8,00 | 17,00 | 2,12 | 2,50 | 1,00 |
| | 37.676,00 | 438.097,45 | 11,63 | 48,00 | 1,00 |



Haraftrat hevur tele-sølan hjá Fiskamarknaðinum á Toftum viku 33 í havt 24 avreiðingar, 223,3 tons fyri 3.404.923 kr. Miðal kiloprísurin her var 15,23 kr.

Yvirlitið yvir hesar avreiðingar um tele-søluna í viku 33 er hetta:

| FISKASLAG | KILO ÍALT | KRÓNUR ÍALT | MIÐAL PRÍSUR | HÆGSTI PRÍSUR | LÆGSTI PRÍSUR |
|---|---|---|---|---|---|
| TOSKUR 1 | 1.768,00 | 28.611,10 | 16,18 | 17,70 | 14,20 |
| TOSKUR 2 | 7.122,00 | 111.885,00 | 15,71 | 16,70 | 13,00 |
| TOSKUR 3 | 26.921,00 | 404.298,60 | 15,02 | 15,70 | 10,00 |
| TOSKUR 4 | 10.398,00 | 145.624,10 | 14,01 | 14,70 | 9,20 |
| TOSKUR 5 | 2.011,00 | 14.986,80 | 7,45 | 9,70 | 5,00 |
| HÝSA 0 | 1.834,00 | 26.409,40 | 14,40 | 16,00 | 13,70 |
| HÝSA 1 | 23.916,00 | 332.389,20 | 13,90 | 15,00 | 11,40 |
| HÝSA 2 | 4.206,00 | 52.611,20 | 12,51 | 14,00 | 11,00 |
| HÝSA 3 | 656,00 | 2.908,00 | 4,43 | 9,00 | 1,00 |
| HVÍTINGUR | 1.551,00 | 11.038,40 | 7,12 | 8,00 | 4,60 |
| UPSI | 113,00 | 365,10 | 3,23 | 3,30 | 2,00 |
| UPSI 1 | 710,00 | 3.801,30 | 5,35 | 5,40 | 5,00 |
| UPSI 2 | 1.611,00 | 8.205,00 | 5,09 | 5,20 | 4,90 |
| UPSI 3 | 17.770,00 | 71.553,00 | 4,03 | 4,60 | 3,00 |
| UPSI 4 | 10.572,00 | 32.838,80 | 3,11 | 3,60 | 1,00 |
| BROSMA 1 | 5.285,00 | 42.280,00 | 8,00 | 8,00 | 8,00 |
| BROSMA 2 | 4.416,00 | 31.795,20 | 7,20 | 7,20 | 7,20 |
| BROSMA 3 | 520,00 | 2.600,00 | 5,00 | 5,00 | 5,00 |
| LONGA | 12,00 | 60,00 | 5,00 | 5,00 | 5,00 |
| LONGA 1 | 11.040,00 | 139.007,20 | 12,59 | 12,60 | 10,00 |
| LONGA 2 | 937,00 | 10.307,00 | 11,00 | 11,00 | 11,00 |
| LONGA 3 | 34,00 | 289,00 | 8,50 | 8,50 | 8,50 |
| LONGA 4 | 12,00 | 24,00 | 2,00 | 2,00 | 2,00 |
| KONGAFISKUR | 214,00 | 1.031,00 | 4,82 | 6,00 | 3,00 |
| KONGAFISKUR 2 | 896,00 | 8.064,00 | 9,00 | 9,00 | 9,00 |
| KONGAFISKUR 3 | 944,00 | 7.080,00 | 7,50 | 7,50 | 7,50 |
| KONGAFISKUR 4 | 103,00 | 226,60 | 2,20 | 2,20 | 2,20 |
| STEINBÍTUR | 1.039,00 | 9.319,50 | 8,97 | 9,30 | 8,70 |
| HAVTASKA | 31.663,00 | 948.932,75 | 29,97 | 33,00 | 26,75 |
| HAVTASKUSPORL | 180,00 | 7.740,00 | 43,00 | 43,00 | 43,00 |
| KALVI 1 | 70,00 | 3.080,00 | 44,00 | 44,00 | 44,00 |
| KALVI 2 | 296,00 | 12.810,00 | 43,28 | 45,00 | 43,00 |
| KALVI 3 | 377,00 | 14.618,00 | 38,77 | 41,00 | 33,00 |
| KALVI 4 | 256,00 | 6.716,00 | 26,23 | 36,00 | 18,00 |
| KALVI 5 | 55,00 | 544,00 | 9,89 | 10,00 | 8,00 |
| SVARTKALVI | 13.338,00 | 153.540,60 | 11,51 | 12,70 | 11,50 |
| REYÐSPRØKA | 6.812,00 | 145.632,80 | 21,38 | 22,10 | 18,60 |
| TUNGA | 29.112,00 | 575.776,10 | 19,78 | 21,00 | 14,60 |
| SKØTA | 4.202,00 | 35.736,00 | 8,50 | 9,00 | 2,00 |
| SKRUBBA | 252,00 | 126,00 | 0,50 | 0,50 | 0,50 |
| LÁLLA | 7,00 | 7,00 | 1,00 | 1,00 | 1,00 |
| HVASSKVOYSA | 1,00 | 15,00 | 15,00 | 15,00 | 15,00 |
| HÁVUR | 30,00 | 30,00 | 1,00 | 1,00 | 1,00 |
| ANNAÐ | 9,00 | 11,00 | 1,22 | 1,50 | 1,00 |
| | 223.271,00 | 3.404.923,75 | 15,25 | 45,00 | 0,50 |

# Eldri føroyingur funnin illa løstaður

INGI RASMUSSEN

Ein 75 ára gamal maður úr Føroyum var sunnudagin funnin illa løstaður í einum kjarrvøkstri á strondini við Faaborg á suðurpartinum av Fyn.

Í fyrstu syftu viðgjørdi løgreglan málið sum eina brotsgerð, tí løst-irnir vóru so ógvusligir í høvdinum. Men tá Dimmalætting tosaði við løgregluna í Faaborg seinnapartin mánadagin roknaðu teir við, at maðurin var dottin.

Tey kundu tó ikki siga við vissu, hvat var hent, tí maðurin hevur fingið so nógvan skaða, at tað ikki bar til at samskifta við.

Løgreglan ger tó samstundis vart við, at støðan ikki er hættislig.

Maðurin og kona hansara skrivaðu seg inn á hotel Klinten í Faaborg leygarkvøldið. Maðurin fór út í bilin eftir onkrum, men kom ikki aftur.

Konan sovnaði, og legði ikki fyrr enn hon vaknaði morgunin eftir til merkis, at maðurin var burtur.

Løgreglan setti eina umfatandi leiting í verk við hundum og tyrlum, tá tey við endan av einum trappum funnu hansara brotnu brillur, ur og eitt petti av hansara skjúrtu við blóði á. Eisini mappan við pengum í var funnin á strondini.

Stutt eftir var maðurin sjálvur funnin í einum kjarrvøkstri. Hann visti til sín, men var illa fyri. Hann var flogin beina leið á sjúkrahúsið í Odense og viðgjørdur fyri skallabrot umframt fleiri aðrar løstir.

Løgreglan roknar við, at tilburðurin er hendur umleið klokkan 22.30 leygarkvøldið, tí urið hjá manninum er steðgað tá.

# Formansskapirnir møtast

Árligi fundurin millum formansskapin í løgtinginum og formansskapin í fólkatinginum verður hildin í Føroyum í morgin. Fundast verður bert hendan eina dagin, men donsku gestirnir eru í landinum í seks dagar

LEIF LAADAL

Formaðurin í fólkatinginum, Ivar Hansen, hevur tveir føroyingar við í sínum ferðalagi, tá ið hann vitjar formansskapin í løgtinginum frá 30. august til 3. september. Føroyingarnir eru sjálvandi teir báðir føroysku fólkatingslimirnir Óli Breckmann og Jóanes Eidesgaard. Harafturat telur danska ferðalagið ella præsidium, sum tað eisini verður rópt, Henning Grove, sum er annar næstformaður í fólkatinginum og Poul Nødgaard, sum er fjórði næstformaður. Hesir báðir hava eins og Ivar Hansen, konurnar við. Ole Stig Andersen og Jørgen Bang Jespersen umboða umsitingina í fólkatinginum. Ole Stig Andersen er stjóri í fólkatinginum og Jørgen Bang Jespersen er skrivari.

Løgtingsformaðurin Finnbogi Ísakson er vertur og hjá sær hevur hann Eyðun Viderø, fyrsti næstformaður í løgtinginum, Vilhelm Johannesen, annar næstformaður, Edmund Joensen, triðji næstformaður og Súsannu Danielsen, skrivstovustjóra, við til fundin.

### Vitja millum annað í Mykinesi

Skráin til vitjanina er bæði drúgv og fjølbroytt. Í gjár hendi tó ikki tað heilt stóra, men longu í fag verður farið til Mykinesar. Seinni verður farið til Havnar. Í morgin er so sjálvur fundurin, umframt at vitja verður í oljumálastýrinum, har greitt verður frá ætlanini fyri oljuleiting í Føroyum. Hósdagin skulu formansskapinir vitja el-verkið í Eysturoynni og seinni sama dag verður vitjað á rækjuvirkinum á Oyri. Ferðalagið fer av aftur landinum fríggjamorgunin.

Dimmalætting
Smyrilsvegur 13,
Postboks 19, 110 Tórshavn

Dimmalætting rindar postgjaldið

106

Ja!

Undirritaði teknar seg sum haldari av Dimmalætting. Kostnaðurin er 280 kr. fyri ein ársfjórðing. Fyri haldarar uttanlands er annar prísur galdandi.

☐ Eg tekni meg sum haldara

*Til ber altíð at gerast haldari. Goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum*

Navn ..............................

..............................

Bústaður ..............................

Postnr. ..............................

Býur/bygd ..............................

..............................

Undirskrift .............. Tlf. ..............